LM-070/2023

Fylgiskjal 9

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Lógaruppskot um ílegulóg II – viðmerkingar Fróðskaparsetur Føroya

Fróðskaparsetrið arbeiðir tætt saman við Sjúkhúsverkinum um gransking og undirvísing, og kemur at arbeiða enn tættari, tá ein universitetssjúkrahúsmodell verður formliga stovnsett. Tískil kemur lógin at ávirka gransking á Setrinum bæði beinleiðis og óbeinleiðis.

Fróðskaparsetrið metir at lógaruppskotið er betra, men til enn einaferð mæla til, at einkarrætturin hjá Fólkaheilsustýrinum til innsavnan, handfaring og varðveitan eigur at vera strikaður. Einkarrætturin er ikki í trá við tær bygnaðarbroytingar, ið vórðu gjørdar fyrr í ár í mun til stovnsetan av einum Fólkaheilsustýri og eini Heilsugranskingareind í Sjúkrahúsverkinum.
Tað virkar undarligt, at Heilsustýrið skal hava ábyrgd fyri innsavning av blóðroyndum, uppreinsan og analysu av DNA, tí hetta eru fastir partar av granskingarverkætlanum og eigur at liggja innan granskingarøkið. Vit meta, at allir táttir av eini granskingarverkætlan eiga granskararnir sjálvir at standa fyri, innan fyri regluverkið sum Vísindasiðseminevndin og Dátueftirlitið áseta. Tískil mæla vit til sum sagt fleiri ferðir, at kapitul 2 **(§ 2 og § 3)** um einkarætt verður strikaður.

Í **§ 5** stendur at skráirnar burturav skulu vera í Føroyum. Ongi undantøk verða nevnd í lógartekstinum, men í viðmerkingunum stendur at upplýsingar kunnu viðgerast aðrastaðni um hetta er neyðugt. Vit halda at hetta undantakið burdi verið nevnt í lógartekstinum.